Landsfelag Pensjónista

Argir 29. jan. 2026

Almanna- og heilsumálaráðið
Kopargøta 1
100 Tórshavn

Verður sent við telduposti til t-post: ahr@ahr.fo og heri@ahr.fo

HOYRINGSSVAR
til
Uppskot til
Løgtingslóg um leigustuðul
Mál nr. 26/00962

Landsfelag Pensjónista hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið:

Landsfelag Pensjónista heldur tað vera skilagott, at húski, sum búgva til leigu í sjálvstøðugari íbúð, hava rætt til leigustuðul, um treytirnar sambært lógaruppskotunum eru fylgdar sambr. §1 og §3. Mesta upphæddin kr. 1.500 um mánaðin í lógaruppskotinum er ov lágt, og mæla vit til, at upphæddin verður hækkað til kr. 3.000 um mánaðin.

Sum støðan á íbúðarmarknaðinum í løtuni er, eru nógvir pensjónistar í tí støðu, at húsini, teir hava búð í, eru vorðin ov stór hjá teimum at búgva í, orkan at halda tey viðlíka er ikki hin sama longur. Nógv eldri fólk, sum í mongum førum hava mist makan, vilja fegin hava okkurt minni at búgva í.

Fíggjarviðurskiftini kunnu í longdini gerast ov trupul at fáa at hanga saman, eftir sum leiguíbúðir eru í so kostnaðarmiklar, og fólkapensjónin røkkur ikki langt.

Fyri at løgtingslógin um leigustuðul verður so rættvís sum yvirhøvur gjørligt, mæla vit til, at allir leigusáttmálar verða góðkendir av eini av kommunalt góðkendari húsaleigunevnd, áðrenn stuðulin verður latin sambært uppskotinum um løgtingslóg um húsaleigustuðul.

Vinaliga

Beate L. Samuelsen, forkvinna